# Býta um íbúð – yvirlit yvir mannagongd

Leigarar, sum hava búð í minsta lagi í trý ár í ávísari íbúð, kunnu søkja Bústaðir um at kunna býta um íbúð við annan leigara hjá Bústøðum, sum eisini skal hava búð í minsta lagi í trý ár í ávísari íbúð.

Fyri at henda skipanin løgfrøðiliga skal vera haldbar, er neyðugt, at umbýtið verður handfarið, við at báðir leigarar uppsiga síni leigumál, avgreiða øll viðurskifti við verandi leigumál, og síðani gera nýggjan leigusáttmála fyri nýggja leigumálið. Munurin á vanligari uppsøgn av íbúðini og at býta um íbúð er, at leigarin í hesum førinum sjálvur hevur funnið nýggjan leigara, og íbúðin tí ikki skal bjóðast til leigu eftir bíðilistanum.

Í sambandi við flytingina kann væntast, at leigararnir koma at hava tørv á at hava sítt innbúgv á goymslu í ávísa tíð, meðan íbúðirnar verða umvældar. Hóast íbúðirnar standa tómar vegna umvælingina í flytingini, tá leigararnir í hesum førinum býta um íbúðir, koma leigararnir at gjalda húsaleigu fyri leigumálið, sum flutt verður úr, heilt til flutt verður í íbúðina, sum flutt verður til.

Niðanfyri er mannagongdin sett upp:

| **Nr.** | **Tekstur** |
|---|---|
| 1 | Leigarin skal hava búð í íbúðini í trý ár |
| 2 | Bústaðir skal fáa skrivliga umsókn um at býta um íbúð, sum báðir leigarar hava undirskrivað, og Bústaðir skal góðkenna býtisavtaluna (sí oyðiblað niðanfyri) |
| 3 | Um treytir eru fyri at kunna leiga ávísa leigumálið (t.d. vera lesandi), skal treytin framvegis vera uppfylt, fyri at býtisavtalan skal kunna góðkennast |
| 4 | Báðir leigarar skulu uppsiga síni leigumál |
| 5 | Tað verður gjørt útflytingarsýn av íbúðunum og ein frágreiðing um feilir, skaðar og manglar verður gjørd |
| 6 | Bústaðir fær lyklar frá leigarunum, sum flyta |
| 7 | Møguligir feilir ella skaðar í íbúðunum, ið skulu umvælast, verða gjørdir |
| 8 | Nýggir leigusáttmálar verða gjørdir við húsaleigu og depositum, ið hoyrir til íbúðina |
| 9 | Innflytingarsýn verða gjørd |
| 10 | Innflytingardagur verður avtalaður |
| 11 | Fyrsta húsaleigan og depositum skal vera goldið, áðrenn lyklar verða útflýggjaðir |
| 12 | Lyklar verða útflýggjaðir, lyklaváttan undirskrivað og málarar fyri orku verða avlisnir, so gerast kann upp, hvussu nógv skal gjaldast í orkugjaldi, har flutt verður frá, og hvat málarar vísa við innflyting, har flutt verður til |
| 13 | Depositum fyri íbúðirnar, sum flutt verður úr, verður gjørt upp og avroknað |

*Seinast dagført 04.04.2023*

bústaðir
Føroya bústaðafelag

# Umsókn um at býta um íbúð

| Um umsóknin verður gingin á møti, vil býtið av íbúðum vera gjørt | Dagfesting |
|---|---|

Eg samtykki, at býtið av íbúðunum ikki kann gerast, fyrr enn nýggir leigusáttmálar er undirskrivaðir, depositum og fyrsta mánaðarleigan o.a. er goldið til Bústaðir. Eg eri varug/-ur við, at tað í nøkrum býlingum eru ávís krøv til tey, sum leiga. Býtið kann bert góðkennast, um tann, sum býtt verður um íbúð við, lýkur krøvini (t.d. um talan er um lestrarbústað ella um íbúðin er til ávísan aldursbólk).

Henda umsókn skal skiljast sum uppsøgn av mínum verandi leigumáli frá í dag við tí ásettu uppsagnarfreistini, tó treytað av, at Bústaðir góðkennir umsóknina. Umsóknin skal undirskrivast bæði av leigaranum og møguligum hjúnafelaga ella persóni, sum viðkomandi livur saman við í parlagi (sambúgva). Lyklarnir skulu ikki latast tí, sum býtast skal um íbúð við, men skulu latast Bústøðum.

Bústaðir kann ógilda leiguavtaluna, um tann, sum býtast skal um íbúð við, ikki yvirtekur íbúðina og ikki nýtir íbúðina sum sín fasta bústað, ella um býtið av íbúð ikki verður gjørt.

## Egnir upplýsingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr. á leigumáli | | Telefonnummar | |
| Navn | | P-tal hjá leigara | |
| Navn hjá møguligum sambúgva | | P-tal hjá møguligum sambúgva | |
| Bústaður | | Postnummar | |
| Bygd/býur | | Teldupostadressa | |

| Dagfesting og undirskrift hjá leigara | Dagfesting og undirskrift hjá møguligum sambúgva |
|---|---|

## Upplýsingar um tann, sum býtast skal um íbúð við

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr. á leigumáli | | Telefonnummar | |
| Navn | | P-tal hjá leigara | |
| Navn hjá møguligum sambúgva | | P-tal hjá møguligum sambúgva | |
| Bústaður | | Postnummar | |
| Bygd/býur | | Teldupostadressa | |

| Dagfesting og undirskrift hjá leigara | Dagfesting og undirskrift hjá møguligum sambúgva |
|---|---|

*Seinast dagført 04.04.2023*